## Fekk minu í trolið

Íslendski trolarin Þorvarður Lárussin fekk um vikuskiftið eina minu í trolið, meðan teir royndu úti fyri Látrabjargi á Vestfirðum. Teir boðaðu alt fyri eitt sjóverjuni frá, og spreingiserfrøðingar staðfestu, at talan var um eina minu, sum týskarar høvdu lagt undir seinna heimsbardaga fyri at órógva skipaferðsluna millum Amerika og Murmansk í Russlandi. Hóast minan var meiri enn 60 ára gomul, virkaði spreingievnið væl, skrivar Morgunblaðið.



*Minan var týsk og frá seinna heimabardaga (Mynd: Vísir)*

# itektoniskur býlingur



*Anders Adam, arkitektur, greiddi væl frá Høganesætlanini, og her er tað Niclas Foldbo, verkfrøðingur, sum lurtar við stórum áhuga. Eftir framløguna var høvi hjá fólki at práta við ymisku partarnar um ætlanina, áðrenn farið varð inn undir Høganes at hyggja at lendinum*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

- Vit skulu helst ikki spreingja okkum fram og heldur ikki hava ov stórar útfyllingar. Í staðin skulu sethúsini og stórhúsini, sum bygd verða í økinum, lagast eftir landslagnum. Vit hava gjørt nógv burtur úr at vera í økinum og hava hugt at, hvat er áhugavert.

Sum skiltist á Anders er ætlanin í minst møguligan mun at broyta økið, og ætlanin er eitt nú ikki at beina burtur klettarnar, sum liggja undir Høganesi, tí hesir skulu framhaldandi vera ein partur av hugnaliga umhvørvinum.

- Soleiðis sleppur landslagið undir Høganesi at vera, sum tað er í dag.

Anders Adam vísti á, at í økinum verða smærri og størri hús og stórhús hvørt um annað.

- Soleiðis fáa vit nøkur "rolige elementer" í landslagið, men einki av húsunum verður hægri enn tað hægsta á Høganesi, legði hann aftrat.

Tað verður øðrvisi hjá fólki, sum fara at byggja undir Høganesi enn hjá fólki, sum byggja aðrastaðni í Nes kommunu. Býlingurin verður neyvt stýrdur av arkitektum, og tú fer ikki at kunna byggja, seta og mála húsini, sum tú sjálvur vilt – og bilurin fer at standa í felags bilhúsi.

Sosialurin fer at venda aftur til onnur viðurskifti í sambandi við stóru Høganesætlanina í øðrum blað.

*Tær sita og summa seg eftir framløgufundin. Við síðuna av stendur eitt modell av einum stórhúsi, sum er partur av ætlanini*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

